## Klumman



**Kári Mikkelsen**
karim@sosialurin.fo

### Sjónvarp við skrantandi skrá

Okkara kæra kringvarp er ikki sum onnur kringvørp í heiminum. Í hvussu er ikki tey, sum kunnu røkkast í televarpi ella fáast niður umvegis eina parabolantennu. Um leiðslan í Kringvarpinum heldur føroyingar vera serliga tornæmar ella tápuligar, er ilt at meta um, men tað kundi sæð soleiðis út. Í øllum førum havi eg ongantíð á nakrari aðrari rás, sum eg havi havt atgongd til seinastu nógvu árini, ella so leingi veljast kundi ímillum fleiri rásir, verið út fyri, at skráin stendur so leingi á skerminum ísenn, sum í føroyska sjónvarpinum.

Er endmálið at geva fólki møguleika fyri at fara á bukkina uttan at ganga glipp av næstu sendingini, er málið rokkið fyri hesi viðkomandi. Og er endamálið at fáa kritiskar hyggjarar burtur frá vánaligum sendingum inn á onkra áhugverdari rás, ja, so er hetta ein sera effektivur máti at gera tað uppá. Ella er tað í eini vælmeinandi roynd at lekja okkum fyri tað rastloysi, sum eykennir tíðina, vit liva í, so hattin av fyri tí. Men um kringvarpsleiðslan er so glað fyri tað nýggja búmerkið hjá Kringvarpinum, at vit hyggjarar skulu tvangsinnleggjast til at taka tað til okkum, ja, so er hetta miseydnast í ólukkumát. Í hesum zappitíðun er tað valla ein sál, sum tímir at gløða longri enn eitt hálvt minutt upp á eina sjónvarpsskrá. Tað verði seg flott bakgrund ella ei.

Hetta er valla heldur "skumli" baktankin hjá kringvarpsleiðsluni, tí hvør sjónvarpsrás vil ikki hava allar teir hyggjarar, sum tilber at støva upp.

Heldur man orsøkin vera vánalig tilrættalegging. At man ikki hevur tíð, orku ella dugnaskap nokk til at fáa skrá og klokkutíðir til at passa saman. Men hví er hetta so torført í Føroyum, tá tað eftir øllum at døma letur seg gera alla aðrastaðni í heiminum?

Er hetta eitt eyðkenni fyri okkara lítla, føroyska samfelag, har planlegging er eitt fremmandaorð alt ov nógvastaðni? Eg veit ikki, men tá tað eftir øll hesi ár ikki er eydnast at fáa eina skrá, ið megnar at halda seg so nøkunlunda til tær klokkutíðir, sum verða kunngjørdar eftir hesi somu skrá, kundi okkurt týtt upp á, at so var.



# Harry Potter aftur á hvíta tjaldinum

*Ron, Harry Potter og Hermoine eru øll við í nýggja filminum um Harry Potter*

**Um eina viku verður fimti filmurin um Harry Potter frumsýndur. Sjónleikarin Daniel Radcliffe er blivin halvvaksin, men hann dugir framvegis at ganda á hvíta tjaldinum, og Hermoine sigst verða blivin strævin at fáast við**

## Filmur



**Eyðun Klakstein**
eydun@sosialurin.fo

Um júst eina viku verður Harry Potter ovast á breddanum í biohøllunum kring heimin. Fimti filmurin um gandakallin hjá J. K. Rowling verður frumsýndur, og sum vanligt er, verður nógv gjørt burtur úr frumsýningini.

Kring heimin hava fólk staðið í bíðirøð fyri at tryggja sær atgongumerki til frumsýningar, og fleiri staðni verður filmurin vístur beint eftir midnátt hóskvøldið. Formliga er frumsýningardagurin fríggjadagin 13. juli, og nógva staðni vilja fólk ikki bíða longur enn til beint eftir midnátt fríggjanáttina.

### Hálvvaksnar stjørnur

Barnastjørnurnar fra fyrstu filmunum Harry Potter eru nú blivnar hálvvaksnar. Daniel Radcliffe hevur leiklutin sum Harry Potter, og samstundis sum Radcliffe er blivin hálvvaksin, er Harry Potter blivin tannáringur. Men Radcliffe rigar framvegis væl í leiklutin sum gandakallurin, sum dugir meira enn tey flestu við gandastavinum.

Útlendsk bløð skriva, at Emma Watson, sum spælir Hermoine í Potter-filminum, og sum er gentan, ið fólk vilja hava skal finna saman við Harry Potter, er blivin meira ella minni strævin at fáast við.

Emma Watson er 16 ár, og møguliga er hon blivin órógvað av nógvu umtaluni kring heimin, ella er hon bara blivin ein strævin tannáringur.

Sagt verður frá upptøkunum, at unga Watson grenjar so illa, at bæði leikstjóri og viðleikarar eru um at fáa toknir av henni. Hon hevur gramt seg fyri leikstjóranum um, at tað verður arbeitt ov hart, og at hon ikki hevur skrivað undir nakran sáttmála, sum skal hava so nógv arbeiði við sær.

Í sambandi við fimta filmin hava samráðingar eisini verið um tveir teir næstu Potter-filmarnar, og eisini her var Emma Watson ring at fáast við, og framleiðararnir máttu leggja meira pengar á borðið fyri at fáa hana at spæla við í næstu filmunum eisini.

### Grint keypti ísbil

Aðrir av sjónleikarunum í Potterfilminum eru í betri lag, og Rupert Grint, sum spælir Ron, hevur keypt sær sín fyrsta bil, nú hann er blivin 18 ár. Fyrsti bilurin hjá Grint er ein ísbilur, sum hann heldur er sera cool.

Daniel Radcliffe, ið spælir Harry Potter, hevur nú fingið innivist á savninum hjá Madame Tussaud, har kendir sjónleikarar verða eftirgjørdir við flottum voksfigurum. Radcliffe er við sínum 17 árum tann yngsti sjónleikarin, sum er komin á semerkta savnið.

Fríggjadagin í næstu viku verður nýggi filmurin um Harry Potter eisini frumsýndur í Havnar Bio.